## Styrkt teknisk umsiting

Klaksvíkar kommuna hevur styrkt umsitingina á Teknisku deild við tveimum fólkum. Einum umhvørvisleiðara og einum landmálingsteknikaria. Hanna Dalsenni er sett í starv sum landmálingsteknikari í kommununi, og Tórhild Bjarkhamar er sett í starv sum umhvørvisleiðari. Tórhild verður eisini skrivari í Heilsu- og Umhvørvisnevndini.



## Spælipláss fyri 700.000 kr.

Hvalbiar kommuna hevur gjørt av, at tey nú fara at gera eitt stórt spælipláss í bygdini. Á heimasíðuni hjá suðuroyarportalinum verður sagt, at ætlaði kostnaðurin av spæliplássinum verður um 700.000 kr., og at økið tá – umframt spælipláss – eisini hevur eitt øki, har foreldur og onnur kunnu sita, meðan børnini spæla á spæliplássinum. Sigmund Signarsson og Sylvan Poulsen hava gjørt uppskotið til spælipláss.

# Dýrt at ringja úr Danmark

**Tað kann vera eitt dýrt njótilsi at vera telefonkundi hjá svensku telefyritøkuni, Telia, um tú býr í Danmark og ætlar tær at ringja til næstringar og vinfólk í Føroyum og fáa eitt langt og hugnaligt prát. Ella blíva uppringdur**

TELEFONPRÍSIR
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Ein føroysk kona í Danmark mundi fingið sjokk, tá hon fekk telefonrokningina frá Telia, sum er ein svensk telefyritøka, ið situr á fittum marknaðarparti av telefonkundum í Danmark. Um jólini tosaði hon í ein hálvan tíma til Føroya, og hetta kostaði henni 1000 krónur.

Hetta er ikki so løgið, tí við at hyggja á heimasíðuna hjá Telia, sæst, at tað kostar ikki minni enn 16,38 krónur um minuttin fyri ein føroying, sum er kundi hjá Telia, at ringja til Føroya ella fáa eina telefonuppringing úr Føroyum. Til samanberingar kostar tað einans tvær krónur um minuttin, um telefonsamtalan er til ella úr Svøríki, Noregi ella Finlandi.

Telia hevur býtt heimin upp í seks øki (zoner). Í øki 1 eru tey trý omanfyri nevndu londini, har tað kostar 2,50 krónur at ringja til og frá. Í øki 2 finst stórur partur av ES-londunum, har prísurin er 3,88 krónur. Í hesum bólkinum er eisini Ísland..

Í øki 3 finnast finnast millum annað nógv fyrrverandi sovjet-hjálond, Turkaland og Albania og tey av evropeisku londunum, ið eru uttanfyri ES. Her er prísurin 5,25 krónur. Øki 4 fevnir um Kanada og USA og kostar 4,38 krónur, meðan Australia og fleiri asiatisk lond eru í øki 5. Her er prísurin 9,38 krónur. Síðani er eitt rættiligt lop upp til restina av heiminum, sum er býttur í øki 6, har tað kostar 16,38 krónur at ringja ella verða ringdur upp frá. Og har er alsto Føroyar eitt av hesum londunum.

Sosialurin hevur spurt kunningarstjóran hjá Telia, hví Føroyar kemur undir »restina av heiminum« og ikki undir til dømis »norðurlond« ella »restina av Evropa«.

- Tað er tí, at Føroyar eru lítlar og liggja uttanfyri ES.

Men Ísland og Noreg, sum ikki eru limir í ES, liggja í prísøki 1 og eru tískil nógv bílari? Hví?

- Har er meiri teletrafikkur. Eg má tó viðganga, at prísurin er høgur, men vit hava havt undirskot av samskiftinum millum Føroyar og Danmark, og hetta er orsøkin til høga prísin, sigur Anders Reintoft, kunningarstjóri, Telia.

Í sama andradrátti lovar hann, at Telia fer at kanna málið nærri, og uttan at lova nakað, væntar hann, at teleprísurin millum Danmark og Føroyar verður settur niður.

| Opkald til udlandet | Opkald mobil / fastnet |
|---|---|
| ZONE 1 | 2,50 kr. |
| ZONE 2 | 3,88 kr. |
| ZONE 3 | 5,25 kr. |
| ZONE 4 | 4,38 kr. |
| ZONE 5 | 9,38 kr. |
| ZONE 6 | 16,38 kr. |

*Prísir á heimasíðuni hjá Telia. Føroyar eru í Zone 6, har tað altso kostar 16,38 krónur um minuttin at tosa fyri ein Telia-kunda*

Udlandszoner:

| Udlandszoner | |
|---|---|
| ZONE 1 | Norge, Sverige, Finland |
| ZONE 2 | Andorra, Belgien, Bulgarien, Cypern, Estland, Finland, Frankrig, Fransk Guyana, Gibraltar, Grækenland, Guadeloupe, Holland, Island, Irland, Italien, Letland, Liechtenstein, Litauen, Luxembourg, Malta, Martinique, Monaco, Norge, Polen, Portugal, Reunion, Rumænien, San Marino, Slovakiet, Slovenien, Spanien og Kanariske Øer, Schweiz, Storbritannien, Sverige, Tjekkiet, Tyskland, Ungarn, Østrig |
| ZONE 3 | Albanien, Armenien, Azerbaijan, Bosnien-Herzegovina, Georgien, Guernsey - Isle of Man - Jersey/Storbritannien, Hviderusland, Kirgistan, Kosovo, Kroatien, Makedonien, Moldavien, Rusland, Serbien-Montenegro, Tadsjikistan, Turkmenistan, Tyrkiet, Ukraine, Uzbekistan |
| ZONE 4 | Canada, USA |
| ZONE 5 | Australien, Hong Kong, Indien, Japan, Kina, Macau, Malaysia, New Zealand, Singapore, Sydkorea, Taiwan. |
| ZONE 6 | Resten af verden |

*Soleiðis býtir Telia, ið nógvir føroyingar í Danmark eru kundar hjá, heimin upp í. Føroyar hoyrir undir zone 6 »resten af verden«*

# Demokratisk ónøgd um demokrati

**Fullveldishugað vilja hava ABC-flokkarnar at vitða ynski um størri sjálvbjargni. Ein demokratiskur rættur, sigur løgmaður, sum tó eisini vil hava sín demokratiska rætt at samráðast**

POLITIKKUR
*Jákup Mørk*

Klokkan 15.30 í dag verður skipað fyri tiltakið, har víst verður á ónøgdina um, at ABC-flokkarnir ikki tykjast geva ynskinum um fullveldi nóg stóran ans.

Sunnvá Háberg Eysturstein, sum er ein av stigtakarunum, segði á døgurða við Rás2, at talan sum ikki er um eitt mótmæli móti teimum samráðingum, sum í løtuni ganga fyri seg.

- Talan er um eina áminning um, at fullveldisflokkarnir (Tjóðveldi, Fólkaflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Miðflokkurin, blðm.) eisini vunnu sær ein greiðan meiriluta á valinum. Og tí meta vit, at tað er eitt ynski frá Føroya fólki, at talan verður um økt sjálvbjargni, segði hon.

Tey, sum verða við í gonguni, hittast við Sjónleikarahúsið í Havn, og haðani verður gingið oman á Vaglið, har sjálvt tiltakið verður hildið.

### Ambivalent

Løgmaður, Jóannes Eidesgaard, var eisini gestur á Rás2, og hann var púrasta samdur í, at talan er um ein demokratiskan rætt at gera vart við sína ónøgd.

- Tað hava tey sjálvandi rætt til, og tí hvørki ætli ella fái eg forðað fyri. Sjálvandi siti eg við mandatinum til tær samráðingar, sum nú fara fram, men eg ætli ikki at forðað øðrum.

- Og onkursvegna tykist mær hetta eisini eitt sindur ambivalent. Tí hetta hevur onkrar undirtónar av einum mótmæli móti, at onnur brúka sín demokratiska rætt at skipa eina samgongu. Vit, sum nú samráðast, hava eisini undirtøku frá 60% av Føroya fólki, so vit kenna okkum hava fullan uppbakning til okkara samráðingar.



*Tað er eitt sindur ambivalent, tá fólk nýta sín demokratiska rætt til at gera vart við ónøgd um, at onnur nýta sama demokratiska rætt, helt løgmaður, sum á døgurða var í studio hjá Rás2*
Mynd: Jens Kr. Vang

Løgmaður legði afturat, at samráðingarnar enn ikki eru komnar so langt, at hann fær sagt nakað ítøkiligt um, hvørji stig møguliga verða tikin á fullveldisleið. Men hann sigur seg heilt týðiliga kenna ein vilja til at fremja framstig – eisini á tí økinum.